# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio á Ras2**
*hósdagin kl. 16.05*



*Ein hálv millión Ford Fiesta eru framleiddir og seldir síðan oktober 2008*

## Hálv millión Fiesta

Bert eitt ár eftir at nýggi Ford Fiesta kom á marknaðin er longu ein hálv millión bilar seldir.

Eftir at nýggi Fiesta, ið er ein heimsbilur hjá Ford, kom á evropeiska marknaðin í oktober 2008, er hann ein av mest seldu bilum í Evropa og tann mest seldi í sínum klassa.

Fiesta verður gjørdur í Týsklandi, Spania og Kina, eins og teir eisini skulu framleiðast í

Thailandi og Mexico. Ford hava eina ætlan um, at áðrenn fimm ár eru liðin, skulu teir framleiða eina millión Fiesta um árið.

*Kelda: Ford Motor Company*



*Fiat Punto EVO sum kemur á marknaðin síðst í hesum árinum*

## Fiat Punto EVO

Ein nýggjur Fiat Punto kemur síðst í hesum árinum í eini útgávu, sum nevnist Fiat Punto EVO.

Í mun til Grande Punto er Punto EVO nógv broyttur bæði hvat designinum uttan og kabinuni viðvíkur. Allir motorarnir eru sera økonomiskir og lúka tey strongu ES-krøvini til CO útlát, sum koma í gildi í 2015.

Punto EVO hevur nógvar innbygdar trygdarskipanir og verður ein tann tryggasti í sínum klassa við t.d. sjey airbag, Hill Holder og ESP sum standard.

*Kelda: Fiat Group Automobiles Denmark A/S*




*Naddoddur Jacobsen, bilmekanikari hjá P/F Wenzel. Hann er 70 ára gamal og framvegis virkin eftir at hava arbeitt við bilum í samfull 52 ár*

Bilradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05

# Hálva øld við bilum

Í sendingini Bilradio á Ras2 hósdagin kl. 16.05 er samrøða við Naddodd Jacobsen, sum herfyri fylti 70 ár. Naddoddur fór í læru sum bilmekarikari hjá Frits Jensen í Rættará í 1957. Í 1959 flutti hann við Frits í spildurnýggju Esso-støðina í Gundadali. Naddodd arbeiddi hjá Frits Jensen til 1984, tá fekk starv hjá P/F Wenzel Petersen. Í dag eitur fyritøkan P/F Wenzel, og Naddoddur er framvegis til arbeiðis har. Í sendingini sigur hann frá nógvum áhugaverdum og um broytingarnar hesi 52 árini hann hevur arbeitt í bilbransjuni.

Í sambandi við at føroyska deildin hjá donsku útleigufyritøkuni Nordjysk Lift er flutt í nýggjan virkisbygning á Hjalla varð almenn móttøka fríggjadagin 6. november. Samrøður eru við føroyska deildarleiðaran Eyðun Egholm og við umboð fyri Nordjysk Lift í Danmark.

Eisini verður ein Citroën C3 Picasso royndarkoyrdur saman við Magnusi Remberg, sølumanni hjá Ivan Bilar við Hoyvíksvegin.

**mg**




*Her er Naddoddur til arbeiðis hjá Frits Jensen í Gundadali. Bilurin er ein Ford Fairlane árgang 1960. Hin maðurin á myndini er Oddmar Rasmussen, sum eisini lærdi til bilmekanikara á Esso-støðini*




*Magnus Remberg sølumaður hjá Ivan Bilum við nýggja Citroën C3 Picasso*